# Málrok á Tvøroyri

*2. deild: HB formaðurin skeyt hat-trick, men mátti kortini taka til takkar við greiðum tapi*

Jákup Mørk

TB-HB 7-4 (3-0)

Avrikini hjá næstbesta HB liðnum hava higartil í ár verið sera óstøðug, og tí var tað kanska við blandaðum vónum, at hópurin leygardagin fór um suðuroyarfjør, har dystur móti TB stóð á skránni.

Undan kappingin var TB av mongum metta at vera eitt gott boð um ein møguligan uppflytara, og við sigrinum á HB otaðu teir seg fyri fyrst heilt upp í oddin.

**Alt skrædnaði**

Fyrstu løtuna av dystinum, stóð HB liðið seg tó sera væl, og eingin mundi helst gruna, at talan skuldi gerast um stórsigur av nøkrum slag.

Brádliga var tað tó sum um at alt skrædnaði, og áðrenn teir rættuliga vóru komnir fyri seg, hevði heimaliðið lagt seg á odda við málum frá Sumba-venjaranum, Milan Cimburivic, landsliðsleikaranum, Óla Johannesen og Dan Mortensen.

Skil kom tó aftur á spælið hjá gestunum, men flestu áskoðararnir mundu helst vera eitt sindur róligari, nú TB hevði vunnið sær eina somikið trygga leiðslu.

Í seinna hálvleiki fekk TV tað betur byrjanina, og onkur fór kanska at óttast eitt rættuligt skrædl, eftir at Óli Johannesen, Andre Dalfoss og Bárður Dimon høvdu økt upp í 6-0.

HB formaðurin, Gunnar Mohr, hevur tó ongantíð verið leikarin, sum hevur givið skarvin yvir, og soleiðis var heldur ikki hesu ferð. Við trimum málum á rað syrgdi hann einsamallur fyri, at spenningur aftur kom í dystin, og brádliga var líkt til at nervar eisini komu upp í leikin hjá heimaliðnum.

Umframt tey trý málini, hevði HB nevnliga fleiri góðar málmøguleikar hesa løtuna, og brádliga tóktist tað als ikki ósannlíkt, at tvørámenninir skuldu vera fangaðir aftur.

Bárður Dimon fekk tó sett alt endaliga upp á pláss, tá hann økti upp í 7-3, og so kundi tað meira ella minni vera tað sama, at Uni Mortensen móti endanum setti fríspark beinleiðis í málið.

**Krevur styrk**

Við sigrinum tók TB seg upp á ovastu rók á stigatalvuni, har teir eru ájavnir sundalagsmonnum við 9 stigum.

Einki er tó at taka seg aftur í, at við núverandi manning verður tað sera trupult hjá tvørámonnunum at standa seg í bestu deildini, um teir megna at halda fast um oddasessin alt árið.

Í løtuni er Óli Johannesen heima og hjálpir til, men eftir fyrru helvt av kappingarárinum fer hann aftur til Danmarkar. Fleiri aðrir góðir leikarar eru á liðnum, men í flestu førum er talan um leikarar, sum lítlar og ongar royndir hava við fyrstudeildarfótbólti, og tí er vandi fyri stórtapum, um teir skulu royna seg móti bestu liðunum í landinum, og hetta kom eisini greitt til sjóndar í steypakappingini.

Hinvegin kann helst roknast við, at tvørámenn vilja styrkja liðið við fremmandum leikarum, um teir vinna upp í 1. deild, og so er støðan brádliga ein heilt onnur.

Fyri fyrst ræður tó um at standa seg nóg væl í næstbestu deildini, har ungu leikararnir helst hava nógv betri umstøður at mennast, bæði leikliga og kropsliga.

**TV-HB 7-4 (3-0)**

1-0: Milan Cimburivic
2-0: Óli Johannesen
3-0: Dan Mortensen
4-0: Óli Johannesen
5-0: Andre Dalfoss
6-0: Bárður Dmon
6-1: Gunnar Mohr
6-2: Gunnar Mohr
6-3: Gunnar Mohr
7-3: Bárður Dimon
7-4: Uni Mortensen

# Reyðu kortini fuku í vindinum

*1. deild: Tvey reyð kort vórðu havd á lofti, tá B36 fríggjadagin styrkti um oddastøðuna, og yvirhøvur var talan ikki um nakran vakran fótbóltsdyst*



*Ronnie Samuelsen skoraði ikki fríggjadagin, men nýggi liðskiparin kundi fegnast um enn ein sigur, umframt at øll hini oddaliðini mistu stig*
***Mynd: Emil Simonsen***

Jákup Mørk

B71-B36 1-2 (0-2)

Líkindini vóru ikki av teimum bestu, tá árstalsfeløgini bæði, B71 og B36, tørnaðu saman á Sandi dýra biðjudag. Nógvur vindur lá eftir vøllinum, og hetta darvaði eisini spælinum rættuliga nógv, soleiðis at talan sjáldan gjørdist um nakað væl skipað fótbóltsspæl, men heldur um langar bóltar, í vón um at onkur vandamikil støða kundi spyrjast burturúr.

**Vindurin stýrdi**

B36 hevði vindin í ryggin fyrra umfarið, og hetta viðførdi eisini, at oddaliðið kundi leggja stórt trýst á sandoyarmálið.

Hetta gav eisini úrslit, tá bert seks minuttir vóru leiktir, men málið kom heldur av ósketnum verjuspælið hjá vertunum, enn góðum álopsspælið.

B36 átti fríspark stutt inni á sandoyarhálvuni. Mikkjal Thomassen sendi bóltin hart móti málinum, har Ronnie Samuelsen var hægstur og fekk snittað bóltin til ein púra leysan Håkan Lundholm, sum ótarnaður kundi leggja gestirnar framum.

Ein kundi kanska trúð, at skjóta málið fekk B36 leikararnar at taka sær meira av løttum, men so var kortini ikki. Við hjálp frá veðurgudunum royndu teir framhaldandi at trýsta spælið oman móti B71 málinum, men hóast trýstið var nógv, so spurdust tó ongantíð teir stóru málmøguleikarnir burturúr. Nærmast vóru teir við, tá Kenneth Jacobsen royndi seg við einum bleytum skoti, sum fór upp um Waldemar, men á tvørstongina, og so fingu teir á heimaliðnum ruddað.

Áskoðararnir vóru soleiðis um at sláa seg til tols við, at munurin í hálvleikinum skuldi verða eitt mál, tá ósketni í sandoyarverjuni enn einaferð kostaði mál.

Bergleif Sólsker var staddur ov langt frá Håkan Lundholm, tá hesin fekk bóltin, og í eini roynd at steðga svianum, togaði verjuleikarin í troyggjuna, og so ljóðaði floytan hjá dómaranum. Jákup á Borg setti brotssparkið trygt í netið, og sostatt kundi B36 fara til hálvleiks við eini hampuliga tryggari leiðslu.

**Rok móti endanum**

Í seinna hálvleiki hevði B36 vindin í ryggin, og teir royndu eisini at gera sær dælt av hesum, eins og B36 hevði gjørt tað í fyrra. Hálvleikurin var ikki gamal, tá skot frá Jón Brekku, varð ruddað á mállinjuni, og yvirhøvur var bólturin rættuliga nógv á B36 hálvuni frættist av Sandi.

B36 hevði tó góðan møguleika at økja, tá Jákup á Borg slapp leysur miðskeiðis í hálvleikinum, men enn einaferð gav Waldemar Nowicki eitt dømi um, hví hann verður roknaður sum fremsti málverji í landinum.

Sandoyingar royndu so framvegis at trýsta, men tá einir 15 minuttir vóru eftir at spæla, vórðu teir tó álvarsliga skerdir. Í eini roynd at skumpa Jákup á Borg burtur, rakti Eli Hentze B36 leikaran í andlitið, og so noyddust sandoyingar brádliga at vera kanska týdningarmesta leikara sín fyri uttan.

Sjálvur segði Eli eftir dystin, at reyða kortið helst var í lagi. - Eg royndi at skumpa hann burtur við arminum, men tá hann júst var á veg niður eftir bóltinum, rakti eg hann í andlitið. Sjálvandi spælir hann eisini upp á reyða kortið, við at blaka seg niður, men tá eg rakti andlitið, so er tað helst reytt kort, segði liðskiparin hjá B71.

Munurin í manntalinum varð tó skjótt javnaður, tí minuttin eftir var tað Jákup á Borg, sum noyddist út. Eftir nærdyst og eftirfylgjandi orðadrátti við Alex Nielsen, skumpaði Jákup til danan, og so fall dómurin. Eins og Jákup hevði gjørt tað áðrenn, so royndi Alex eisini at fáa sum mest burtur úr støðuni, og hetta eydnaðist eisini til fulnar.

Beint eftir hetta kom enn meira dramatikkur í dystin, tá tað eydnaðist B71 at minka um munin. B71 átti fríspark stutt uttan fyri brotsteigin. Tróndur Vatnhamar, sum annars stóð ein góðan dyst, megnaði ikki at halda skotinum, sum umvegis hendurnar á málverjanum fór á stongina, og so var Jógvan Jón Petersen fyrstur á.

**Vandamikil hornaspørk**

Eftir málið royndu sandoyingarnir at trðsta enn meira, men tað eydnaðist ongantíð at fáa enn eitt mál, og harvið annað stigið.

Sum so høvdu teir ongar upplagdar møguleikar, men av Sandi siga tey, at talan fleiri ferðir varð um vandamiklar støður. Serliga vóru tað hornaspørkini hjá Julian Florescu, sum elvdi til spentar løtur inni í brotsteiginum, men hvørja ferð megnaði Tróndur at beina bóltin burtur frá málinum. Samdi Julian hevði eisini eina vandamikla frísparksroynd, sum Tróndur eisini fekk jústað út til hornaspark.

Nógv hevur annars verið tosað um, at B36 hevur leitað eftir málverja til besta liðið, men á Sandi siga tey seg ikki skilja, at so skal vera, tí Tróndur stóð enn einaferð ein góðan dyst í málinum.

Annars frættist av Sandi, at fleiri leikarar vóru um at gerast rættuliga heitir móti endanum av dystinum, men at tað tíbetur ikki gjørdist neyðugt hjá dómaranum at fara í reyvalumman nakra ferð aftuat.

Eftir dystin vóru sandoyingarnir rættuliga vónbrotnir um tapið, sum teir hildu vera meira ella minni óneyðugt. Eli Hentze ásannaði tó samstundis, at tað var teimum sjálvum at takka, at so var. - Spælið í fyrra hálvleiki var langt ífrá nóg gott frá okkara síðu, og serliga eftir góða avrikið á Toftum sunnudagin, var hetta skuffandi hjá okkum.

**Ungur aldursforseti**

Dysturin fríggjadagin var fyrsti dysturin hjá B36, síðani John Petersen varð seldur av landinum. Harumframt noyddust havnarmenninir eisini at vera stuðulsleikarar sum Bjarna Prior og Jens Kristian Hansen fyri uttan, og tí er einki at siga til, at teir vóru sera fegnir um sigurin.

Ístaðin fyri hesar leikarar, var pláss til Håkan Lundholm, Carl Herup Høgnesen og Kenneth Jacobsen. Allir ungir leikarar, og at talan í stóran mun er um ungar leikarar á liðnum, verður undirstrikað av, at Magni á Lakjuni við sínum 26 árum var aldursforseti á B36 liðnum.

Ungu leikararnir stóðu tó royndina, og harumframt lagaðu úrslitini í hinum dystinum seg júst soleiðis, sum oddaliðið kundi ynskt sær. Sostatt betraði B36 um støðuna á stigatalvuni, har teir nú eru seks stig framman fyri næstu kappingarneytararnar. HB kann tó minka nakað um munin, um teir vinna útsetta dystin móti FS Vágum.

Hóast fegin um sigurin, so var tað tó ein sera vónbrotin Jákup á Borg, sum vit tosaðu við eftir dystin. Hann var fult greiður um, at reyða kortið, sum hann fekk, var ein bæði býtt og óneyðug útvísing. Harumframt hevði reyða kortið við sær, at B36 eisini má vera toppskjúttan tey bæði seinastu árini fyri uttan, tá teir sunnudagin skulu leika móti grannunum úr HB í kappingini um Løgmanssteypið.

**B71-B36 1-2 (0-2)**

0-1: Håkan Lundholm 6.
0-2: Jákup á Borg 39.
1-2: Jógvan Jón Petersen 77

Dómari: Suni Johansen

**B71:**
Waldemar Nowicki - Bernhard Petersen, Jón Brekku, Bergleif Sólsker - Høgni Hansen, Eli Hentze, Julian Florescu, Kári Nielsen, Jógvan Jón Petersen - Alex Nielsen, Kristian Nielsen

B36:
Tróndur Vatnhamar - Mikkjal Thomassen, Egil Zachariasen, Herbert í Lon Jacobsen - Carl Herup Høgnesen, Jan Guttesen, Jákup á Borg, Magni á Lakjuni - Kenneth Jacobsen, Ronnie Samuelsen, Håkan Lundholm






*Hevði Magnus Poulsen ikki staðið seg somikið væl í B68 málinum, kundi sigurin hjá KÍ uttan stórvegis hóvastak verið væl størri*
***Mynd: JH***

# KÍ sannførandi í tjúgu minuttir

*Sigurin á toftamonnum kom væl og virðiliga til høldar, tá bæði liðini spældu við tíggju monnum*

Klaksvíkingar sóu dýra biðjudag teirra fótbóltsflaggskip vinna fyrsta sigurin í hesum kappingarárinum. KÍ basti toftamonnum, sum ikki vóru væl fyri. Hvørki Fróði Benjaminsen ella Súni Fríði Johannsen vóru við, og sjálvt um avloysararnir á ongan hátt dumpaðu, so kendist tað meint, at tveir av stuðulsspælarunum restaðu.

Serliga meinur var saknurin av Fróða Benjaminsen. Jóannes Jakobsen hevði ætlað at brúka høvuðssterkamannin í miðverjuni, har hann skuldi havt stutt tjóður á Ova Nysted.

**Ikki samanspældir**

Klaksvíkingar hava meiri fólk nú, enn teir hava havt í langar tíðir. Arnold Joensen og Símun Waag Høgnesen, sum vóru við í landskappingardystinum í Gøtu, vóru báðir skaddir, men kortini helt Toimislav Sivic, at Marek Wierzbicki skuldi sita á beinkinum. Pólverjin hevði verið heima í eina viku, og so royndi hann – ivaleyst fyri fyrstu ferð síðani hann kom til Føroya at spæla fótbólt síðst í áttati árunum – at sita á beinkinum allar 90 minuttirnar.

Klaksvíkingar vóru spentir at síggja teir báðar nýggju jugoslavarnar. Málverjin tóktist tryggur í verjupartinum, men hann hevði stórar trupulleikar við málspørkunum á graslíkinum. Álopsmaðurin gjørdi ikki nógv um seg tann tíman hann var á vøllinum. Hann hevði sjálvsagt ilt við at finna saman við liðfeløgunum.

John Ryan, sum hevði verið skaddur í fleiri vikur, tykist resta nógv í at røkka venjingarstøðuna, sum áður hevur verið við til at gera hann ein av týdningarmiklastu spælarunum hjá KÍ. Men kortini var vongverjin í vinstru tann mest eyðsýndi á heimaliðnum. Hann vann nærdystirnar, tað var tyngd í, tá hann bjóðaði seg til í álopsspælinum, og fleiri innlegg vóru vandamikil.

**Kortini stóran týdning**

Umstøðurnar at spæla í vóru hampuliga góðar, men kortini var nógv sparkarí. Nærdystirnir vóru nógvir, og tøvandi dómarahugburðurin gjørdi, at teir vórðu ofta ófantaligir. Hýrurin var ikki nakað serligur, og at Pazek leyp framav og fekk reyða kortið, mundi vera greið ábending um, at teir á heimaliðnum kendu stórt trýst á sær.

Tá KÍ gjørdist undirmannað, noyddust teir at broyta liðið. Kristian á Lakjuni, sum hesa ferð ikki var so eyðsýndur sum móti GÍ, fór í miðverjuna, og har var hann, inntil Niclas Niclassen kom á vøllin.

B68 var aftanfyri 2–1, tá Pazek sá reytt, og sjálvt um B68 einki mál fekk fyrra partin av seinna umfarinum, so hevði tú eina kenslu av, at teir vóru sinniliga omaná, og at teir høvdu góðan møguleika í hvussu so er at fáa eitt stig.

Fyritreytirnar broyttust fullkomuliga, tá Jan Petersen, sum mótstøðumenninir tvær ferðir stutt frammanundan høvdu fingið gul kort fyri at bróta seg ímóti, leyp framav. Tá liðini spældu tíggju móti tíggju, glapp hjá KÍ, sum økti til 3–1.

Jan Joensen hevði sum einastu uppgávuna at syrgja fyri, at Øssur Hansen ikki slapp at spæla við. Tað toldi B68 liðið ikki, og KÍ fekk fult tamarhald á. Síðstu løtuna vaknaðu bæði heimamenninir og stuðlarnir kring vøllin. Hesa løtuna glógvaði tað rættuliga í hjá annars lítið eyðsýndu Heðini á Lakjuni og Rógva Jacobsen, og um Magnus Poulsen ikki hevði staðið so væl í B68 málinum kundi sigurin verið størri, enn hann varð.

**Málini**

Ove Nysted setti hol á, tá hann stútaði í bleytan boga upp um B68 málverjan, sum var á veg úr málinum. Innleggið kom úr høgru frá Harley Bertholdsen, eftir eitt tað besta KÍ álopið í 1. hálvleiki.

Ove Nysted økti til 2–0, tá hann sendi bóltin uppum seg sjálvan og æi síðunetið. B68 verjan iðraði seg, tí sjálvt um teir høvdu fleiri møguleikar, so eydnaðist teimum ikki at fáa bóltin burtur.

Øssur Hansen minkaði um munin við brotssparki, sum var so mikið tepurt, at tað tók í stólpan. Um brotsteigarmarkið tók Jan Andreasen beinini undan Marlon Jorge, sum var vorðin leysur, eftir at Rógvi Jacobsen hevði mist í uppspælinum í vinstru.

Jákup Eli Olsen var akkurát ov seinur við taklingini, og so var Heðin á Lakjuni feldur. Harley Bertholdsen skoraði trygt úr ellivu metrum, og veteranurin mundi gerast dagsins maður, tá hann ur fimtan metrum og við vinstra beini sendi tvørbóltin úr vinstru frá Rógva Jacobsen, sum hevði smoygt sær framvið Jan Dam, upp í málhornið.

JH

**KÍ:**
Zoltan Kujundzic – Harley Bertholdsen, Andrzeh Pacek, Jan Andreasen, John Ryan – Kristian á Lakjuni, Jan Joensen, Rógvi Jacobsen, Heðin á Lakjuni – Ove Nysted, Srecko Milicevic

**B68:**
Magnus Poulsen – Jan Petersen, Jan C. Dam, Arnbjørn Danielsen, Jákup Eli Olsen – Marlon Jorge, Eyðstein Skipanes, Øssur Hansen, Mannbjørn Nesá – Marcello Marcellino, Øssur Jacobsen

# Fullu aftur

*2. deild: Javnleikur í oddauppgerðini viðførdi, at bæði ÍF og B36 noyddust nakað niður á stigatalvuni*



Jákup Mørk

B36-ÍF 2-2 (1-1)

Oddauppgerð stóð á skránni, tá fuglfirðingar leygardagin løgdu leiðina til Havnar. ÍF, sum undan dystinnum var ósigrað, setti frá fysta leikdegi kós upp móti bestu deildini, og hóast málleysa javnleikin seinasta vikuskifti, var einki at ivast í, at teir ætlaðu sær øll stigini frá teimum næstbestu B36 monnunum.

**Í gávuhýri**

Hetta var tó á onga hátt sjónleigt fyrstu trý korterini av dystinum í Gundadali. Besta liðið hjá B36, hevur fleiri skaðar at dragast við, og hetta viðførir so aftur, at leikarar fell burtur av á næstbesta liðnum, men kortini hevði B36 eitt støðugt trýst á ÍF málið allan fyrra hálvleik.

Somikið illa stóð til, at fyrrverandi ÍF venjarin, sum nú er hjálparvenjari í B36, Piotr Krakowski, sjálvur noyddist at spæla, og frá sweepara plássinum stýrdi hann ungu leikarunum við hepnari hond. Fleiri góðir málmøguleikar spurdust eisini burturúr, men tá heimaliðið slapp framum, var tað við góðari hjálp frá ÍF málverjanum.

Allan Joensen ætlaði sær helst at lofta bóltinum, tá hornaspark varð sent innfyri, men onkursvegna fekk hann ikki fatur á, og ístaðin datt bólturin inn í málið.

Um tað var fyri at siga takk, skulu vit lata verða ósagt, men í øllum førum var B36 verjan skjót at svara aftur. Karl Leonsson var ósketin í verjupartinum, og tá bólturin varð rullaður upp á tvørs, fekk Bárður á Lakjuni fatur á, og eftir at hava drigið framvið tveimum verjuleikarum, setti hann bóltin í netið aftan fyri Rene Torgarð til hálvleiksstøðuna 1-1.

**ÍF betri við**

Í seinna hálvleiki komu fuglfirðingar nógv betri við í dystin, og fleiri ferðir var eisini talan um heilt góðar møguleikar, men Rene Thomsen bjargaði einar tvær ferðrir í stórum stíli, soleiðis at vónin um stig framvegis varð varveitt hjá høvuðsstaðarfelagnum.

Javna støðan helt sær eisini nakað væl inn í seinna hálvleik, men burtur úr so at siga ongum fekk Eyðolvur Petersen brádliga lagt gestirnar á odda. Hetta hendi eftir at bólturin í fyrstu atløgu varð skallaður úr brotsteiginum, men við einum dundurskotið sendi Eyðolv bóltin upp í handara málhorn. Eitt sera vakurt mál, sum B36 málverjin einki fekk gjørt við.

Sostatt var líkt til, at Fuglfirðingar skulu varveita oddasessin, men móti endanum av dystinum eydnaðist tað kortini Johnny Samuelsen at javna, eftir at ÍF málverjin ikki fekk fatur í einum innleggi.

Javnleikur gjørdist endaliga støðan, og hóast teir vóru nær við sigrinum, so tóktust fuglfirðingarnir ikki so øgiliga vónsviknir av hesum. B36 vísti fyri viku síðani, at teir ikki verða lættir at syfta á heimavølli, og kanska var tað hetta, sum fuglfirðingar høvdu í huganum, áðrenn teir fóru á vøllin.

Skulu teir gera sær nakra vón um at vinna seg uppaftur í oddin, er tó neyðugt, at teir serliga í álopspartinum verða betri skipaðir. Málini hesuferð vóru úrslit av einmansavrikinum heldur enn góðum álopsfótbólti, og í longdini er spurningurin helst, um hetta er nóg mikið til at vinna sær sætið aftur í bestu deildini.

**B36-ÍF 2-2 (1-1)**

1-0: Sjálvmál
1-1: Bárður á Lakjuni
1-2: Eyðolvur Petersen
2-2: Johnny Samuelsen